# Stríðshanarnir stríðast saman

**Stríðshanarnir í Tjóðveldisflokkinum í heyst, Høgni Hoydal og Tórbjørn Jacobsen, fara at stríðast saman á listanum hjá Tjóðveldisflokkinum til Fólkatingsvalið. Tað er tískil lagt upp til, at tjóðveldisveljarin sleppur at siga sína hugsan um innanhýsis stríðið tann 8. februar**

TJÓÐVELDISSTRÍÐ
*Páll Holm Johannesen*
*pallsosialurin.fo*



Á flokstinginum hjá Tjóðveldisflokkinum hóskvøldið samtykti ein stórur meirluti, at høvuðsmenninir í innanhýsis stríðnum í flokkinum, Høgni Hoydal og Tórbjørn Jacobsen, verða á listanum hjá Tjóðveldisflokkinum til Fólkatingsvalið í komandi mánaði.

Á fundinum á Hotel Hafnia hóskvøldið var atkvøðugreiðslan 27-3 fyri at jarða stríðsøksina millum floksformannin og fyrrverandi næstformannin. Tað er tískil lagt upp til, at tjóðveldisveljarin sleppur at siga sína hugsan um innanhýsis stríðið, sum hevur valdað í flokkinum í heyst.

Hóast ein stórur meiriluti samtykti at hava Høgna og Tórbjørn á sama lista, vóru kortini røddir á fundinum, sum hildu tað vera burturvið at lata Tórbjørn Jacobsen stilla upp fyri Tjóðveldisflokkin, eftir at ein meirluti av tingmanningini hevur samtykt at útihýsa fyrrverandi fólkatingslimin úr tingmanningini.

Snorri Fjalsbak úr Suðurstreymoyar Tjóðveldisfelag legði uppskot fram um at sýta Tórbirni Jacobsen at stilla upp fyri Tjóðveldisflokkin, men uppskotið fall. Eitt av álitisfólkunum í Eysturoyar Tjóðveldisfelag, Jón Tyril, helt so lítið um, at Tórbjørn Jacobsen slapp at stilla upp fyri flokkin, at hann rætt og slætt meldaði seg úr Tjóðveldisflokkinum á flokstinginum.

### Hvørki Páll ella Finnur

Á listanum hjá Tjóðveldisflokkinum til Fólkatingsvalið eru í alt 21 í tali. Listin er ein blanding av royndum og minni royndum persónum í politiskum høpi. Merkisvert er, at hvørki Páll á Reynatúgvu ella Finnur Helmsdal, sum báðir eru løgtingslimir eru á listanum.

### Valevnini hjá Tjóðveldisflokkinum eru hesi:

Jóannes Eliasen
Maria Jacobsen
Kristbjørg Toftegaard
Tórbjørn Jacobsen
Heini O. Heinesen
Karsten Hansen
Signy Hansen
Heidi Petersen
Niklái Petersen
Sunniva Kollslíð
Dánjal Jákup Jakobsen
Maiken Krabenhøft
Hergeir Nielsen
Jón Guttesen
Annita á Fríðriksmørk
Høgni Hoydal
Kristina Háfoss
Martin Dam
Rubek Lillaa
Sjúrður Skaale
Tórhallur Áslaksson

# Nú var ovboðið

**Valevnið hjá Tjóðveldisflokkinum í Eysturoynni á seinasta løgtingsvali og næstformaðurin í Eysturoyar Tjóðveldisfelag, Jón Tyril, sigur, at hann kennir seg ikki aftur í Tjóðveldisflokkinum longur, og tí hevur hann valt at melda seg úr flokkinum**

TJÓÐVELDISSTRÍÐ
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Avgerðin á flokstinginum hjá Tjóðveldisflokkinum hóskvøldið um at lata Tórbjørn Jacobsen stilla upp fyri flokkin gjørdist ovboðið hjá næstformanninum í Eysturoyar Tjóðveldisfelag, Jón Tyril.

– Tá ein flokkur ikki virðir sínar egnu samtyktir rýkur alt trúvirðið. Ein samd tingmanning skrivaði undir eina samtykt at útihýsa Tórbjørn úr tingbólkinum, og eykaflokstingið fyri jól heitti á tingmanningini at seta í verk sína egnu samtykt, men nú gongur flokkurin brádliga ímóti teirri samtyktini, og tað kann eg ikki standa inn fyri. Tað er eisini ein stór andsøgn, tá formaðurin alment gevur til kennar, at hann einki álit hevur á Tórbjørn Jacobsen, og síðan leggur uppskot fram um, at teir skulu vera á sama lista, heldur Jón Tyril.

Gøtumaðurin sigur seg ikki kenna seg aftur í Tjóðveldisflokkinum longur, og tí hevur hann tikið avgerðina um at taka seg úr flokkinum.

– Tjóðveldisflokkurin kann ikki bjóða seg fram at stýra einum demokratiskum samfelagi, tá flokkurin ikki megnar at virða sína egnu innanhýsis deomkratisku samtyktir, vísir Jón Tyril á.

### Bakka ov nógv

Tað er ikki bert avgerðin hjá flokkinum á flokstinginum hóskvøldið, sum gjørdi, at Jón Tyril valdi at takka fyri seg í Tjóðveldisflokkinum. Hann vísir á, at eitt høvuðseyðkenni í Tjóðveldisflokkinum seinastu árini er, at flokkurin er inkonsekventur, og hetta kann hann ikki áhaldandi góðtaka.

– Tað er tíverri eitt afturvendandi mynstur, at flokkurin velur at bakka. Vit sóu tað í samband við ætlaðu fólkaatkvøðuna í 2001, brævið til ST, og nú í samband við innanhýsis trætuna. Leiðslan í flokkinum er snøgt sagt ov veik og bakkar ov nógv, sigur Jón Tyril.

*Velur Jón Tyril Tjóðveldisflokkin 8. februar?*

– Nei tað geri eg ikki. Eg ætli mær slettis ikki á val.

# Kunning um alment innlit

**Tórshavnar Kommuna sendir nú faldara út í hvørt hús, har kunnað verður um, hvussu ein kann biðja um alment innlit, og hvør hevur rætt til tess**

ALMENT INNLIT
*Ingrid Bjarnastein*
*ingrid@sosialurin.fo*



*Tórshavnar Kommuna leggur nú mannagongdirnar fram, sum hava við alment innlit at gera*

*Savnsmyn*

Mannagongdin viðvíkjandi fyrispurningum um alment innlit skulu gerast greiðari. Tað er ætlanin hjá Tórshavnar Kommunu.

Kommunan ásannar, at viðgerðin av fyrispurningum um alment innlit hevur í fleiri førum ikki verið nøktandi, men nú skal tað broytast.

Saman við Løgtingsins Umboðsmanni hevur kommunan nú skipað heilt greiðar mannagongdir, sum øll starvsfólk, ið hava við slík mál at gera, hava fingið holla vegleiðing í.

Eisini verður ein faldari sendur út í hvørt hús í kommununi, har greitt verður frá, hvussu ein kann biðja um alment innlit. Har verður kunnað um, hvør hevur rætt til at fáa alment innlit, hvørjar mannagongdirnar eru, og nær ein kann vænta svar.

Til dømis skal svar gevast skjótast gjørligt - í seinasta lagi 10 dagar eftir, at biðið er um innlit. Um noktandi svar verður givið, skal tað verða grundgivið skrivliga, eisini um umbønin er framsett munnliga. Um svar ikki verður givið innan 10 dagar, skal kommunan eisini kunna um, hví so er, og nær ein kann vænta svar.

Nøkur mál eru tó undantikin fyrisitingarlógini, har alment innlit er umfatað.

Tað eru til dømis mál, sum innihalda upplýsingar um privatu- ella fíggjarviðurskiftini hjá einum persóni. Upplýsingar um vinnuviðurskifti, sum hava við rakstur ella handilstilknýti at gera, sum kann føra til fíggjarligt tap, eru eisini undantikin.

Innanhýsis skjøl í kommununi eru eisini undantikin. tað eru skjøl, sum kommunan hevur gjørt til egna nýtslu, skriv til aðrar deildir í kommununi og skriv til býráðið ella nevndir tess.

# Óli á Deild á sjálvsstýrislistanum

Stjórin á KT-fyritøkuni, Kervi, og blaðstjórin á Vinnuvitan, Óli á Deild Olsen, er millum nøvnini á listanum hjá Sjálvsstýrisflokkinum, sum stilla upp til Fólkatingsvalið 8. februar. Úr Sjálvsstýrisflokkinum verður boðað frá, at hetta er fyrstu ferð, at Óli á Deild Olsen stillar upp fyri flokkin.

Sjálvsstýrisflokkurin er ikki liðugur við endaliga listan, men higartil hava í alt seks fólk játtað, at tey stilla upp fyri flokkin. Millum nøvnini eru løgtingslimurin, Kári P. Højgaard, og atkvøðuslúkurin í Suðurstreymi á seinasta løgtingsvali, Malan Johansen.

**.páll**

**Fyribilslistin hjá Sjálvstýrisflokkinum:**
Kári P. Højgaard
Kenneth Rasmussen
Malan Johansen
Óli á Deild Olsen
Maiken Skarðenni
Jógvan Skorheim

# Javnaðarlistin ikki klárur enn

Nakað av fundarvirksemi hevur verið í Javnaðarflokkinum seinastu dagarnar í samband við Fólkatingsvalið týsdagin 8. februar.

Sum skilst er flokkurin ikki komin á mál enn við uppstillingini, og væntandi verður vikuskiftið eisini nýtt til at umrøða, hvørji valevni endaliga verða á javnaðarlistanum. Eitt av høvuðsmálunum, sum Javnaðarflokkurin skal taka støðu til er, hvørt nýggi limurin í flokkinum og borgarstjórin í Tórshavnar kommunu, Heðin Mortensen, skal á lista, men fríggjamorgunin var framvegis eingin avgerð tikin í tí málinum.

**.páll**